# Taka kappingina upp

**- Samstarvið við íslendingar hevur styrkt okkum so nógv, at nú kunnu vit veruliga bjóða okkum fram at veita flakavirkjum og størri skipum tænastur, sigur Ólavur Durhuus á Frost**

TÆNASTA
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tað eru nú seks ár síðani, at Eirikur S. Hansen og Ólavur Durhuus stovnaðu fyritøkuna, Frost.

Teir eru báðir útbúnir kølimontørar og hava alt sítt lív arbeitt við køling í Føroyum, í Danmark og í Noregi.

Frost leverar køli- og frystiútbúnað til virki, skip og handlar.

Men fyri hálvum ári síðani tók virksemið hjá teimum eina avgerðandi vend, tí tá seldu teir íslendsku fyritøkuna við sama navni 33 prosent av partabrøvun um í Frost.

Tað er ikki av tilvild, at Frost í Føroyum er farið í samstarv við navnan í Íslandi.

- Frost í Íslandi hevur drúgvar royndir í fiskivinnuni. Har arbeiða eini 30-35 fólk og teir eru størsti veitarin í Íslandi av hesum slagi og arbeiða bæði í Russlandi, í Pólandi og aðrastaðni.

Hetta er sostastt eisini eitt samstarv, sum økir munandi um vitanina og arbeiðsorkuna hjá Frost.

Men við hesum samstarvinum, er Frost í Føroyum eisini blivin ein partur í alheimsgerðini, har landamørk ikki eru ein forðing.

- Hetta samstarvið við íslendingar ger okkum nógv betri før fyri at átaka okkum størri uppgávur, enn vit higartil hava kunnað, sigur Ólavur Durhuus.

- Tað er eisini ein stór trygd hjá okkara viðskiftafólki, at tey vita, at vit hava eitt sterkt, fíggjarligt bakland.

Samstundis fer samstarv ímillum Frost í Føroyum og Frost í Íslandi at innkeypið bíligari og tað fer eisini bøta um kappingarførið hjá Frost í Føroyum í framtíðini.



*Frost í Føroyum er nú betri brynjað til eisini at átaka sær tær stóru uppgávurnar*

### Bjóða seg fram til stórar uppgávur

Og tað er ein møguleiki, sum teir ikki ætla at lata fara afturvið borðinum.

- Vit fara sjálvsagt framvegis at røkja tann marknað, vit hava, sum er at levera ísmaskinur, frysti-og køliskipanir til virki og handlar av ymsum slagi.

Men nú er eisini ætlanin at bjóða seg fram til tær stóru uppgávurnar.

- Endamálið við samstarvinum við íslendingar er, at vit kunnu bjóða okkum fram til at gera tey stóru køli- og frostprojektini í Føroyum, sigur hann.

Hann sigur, at sostatt fer Frost nú at bjóða seg fram at gera køli-og frystiskipanir til tey stóru flakavirkini, bæði ammoniakkskipanir og aðrar skipanir.

Her hugsa teir bæði um at seta nýggjar skipanir upp og at gera ábøtur og broytingar.

- Eisini á hesum øki mennist tøknifrøðin alsamt og skipanirnar verða meiri og meiri orkusparandi, og meiri og meiri automatiseraðar, og vit vera sjálvandi við í fremstu røð, hvat í menningini viðvíkur.

### Taka kappingina upp

Hann sigur, at á hesum øki hevur at kalla ongin kapping verið í Føroyum, tí tað er bara tann eini veitarin og Ólavur Durhuus ivast ikki í, at flakavirkini og tey stóru skipini hava saknað fleiri møguleikar at vlja ímillum.

- At kapping verður á økinum kann bara gagna brúkaranum, leggur hann afturat, tí sum støðan er nú, er bara eitt tilboð at taka støðu til, hava teir onki at samanbera við.

Og hann ivast ikki í, at pláss er fyri tveimum veitarum á hesum øki í Føroyum.

Frost er við á Fish Fair í ár og har fara teir at greiða frá teimum tænastum, teir eru førir fyri at veita.

Og ikki minst fara teir at greiða frá teimum nýggju tænastunum, teir nú eru førir fyri at átaka sær.

Á eini stevnu sum Fish Fair, fáa vit høvi at hitta okkara viðskiftafólk andlit til andlits og tað er ein møguleiki, sum tey á Frost fegin taka av.

- Tað er bæði stuttligt og áhugavert at hitta okkara viðskiftafólk og at hoyra teirra sjónarmið, tí tað ger okkum sjálvandi eisini betri førar fyri at veita tað røttu tænastuna, sigur Ólavur Durhuus.



Box 3244
FO-110 Tórshavn
Telefon 311124
Fax 311123
FROST
Sosialurin